# Tey kongaligu vitja víða

**Skráin fyri vitjanina hjá kongsfamiljuni í komandi mánað er nú almannakunngjørd, og ikki kann sigast annað, enn at tey kongaligu fara at vitja víða kring landið**

KONGALIGA VITJANIN

*Terji Nielsen*

*terji@sosialurin.fo*

Fólk kring alt landið hava leingi bíðað í spenningi eftir, at skráin fyri vitjanina hjá kongsfamiljuni skuldi almannakunngerast. Hetta bleiv gjørt seint mánadagin, og skráin avdúkar, at tey kongaligu fara at vitja bæði Norðoyggjar, Eysturoy, Vágar, Sandoy, Suðuroy og høvuðsstaðin.



*Krúnprinsahjúnini fara eitt nú at vitja dagstovnin á Hamrinum á Argjum og Margarinfabrikkina, meðan tey eru í Føroyum. Eisini skulu tey hitta avstraliarar, sum eru búsitandi her á landi*

### Eivør og Deja skulu undirhalda

Sum tey flestu óivað vita, eru tað drotningahjúnini og krúnprinsahjúnini, ið koma á vitjan í Føroyum. Vitjan hjá teimum kongaligu byrjar mánamorgunin 20. juni, tá ið kongsskipið Dannebrog leggur at bryggju í Havn.

Meðan vitjað verður í høvuðsstaðnum, fara drotningahjúnini eitt nú at leggja grundarsteinin til nýggju kirkjuna í Hoyvík. Krúnprinsahjúnini fara millum annað at vitja dagstovnin á Hamrinum á Argjum.

Um kvøldið er løgmaður vertur við ein galladøgurða í Norðurlandahúsinum, har konsert við Eivør Pálsdóttir og Deja verður á skránni.

### Vitja Sandoynna og Suðuroynna sama dag

Týsdagin 21. juni gongur leiðin hjá kongsfamiljuni fyrst til Sandoyar, har vitjað verður í kirkjuni og við útgrevsturin í Junkarins fløtti.

Síðani gongur leiðin til Suðuroyar. Meðan kongsfamiljan vitjar í Suðuroy, fara drotningahjúnini eitt nú at vitja Ruth Smith savnið, samstundis sum krúnprinsahjúnini vitja ullvirkið Sirri.

Eisini verður vitjað á Tvøroyri, og um kvøldið er Tvøroyrar Býráð vertur við ein døgurða, sum verður í høllini í Trongisvági.

### Norðoyatunnilin verður vitjaður

Triðja dagin, ið kongsfamiljan vitjar í Føroyum, gongur leiðin til Norðoyggjar og Eysturoynna. Eitt nú fara drotningahjúnini at vitja Norðoyatunnilin Klaksvíksmegin, meðan krúnprinsahjúnini vitja Leirvíksmegin.

Krúnprinsahjúnini skulu hendan dagin eisini hitta avstraliarar, sum eru búsitandi í Føroyum, í Klaksvík. Sostatt fær Mary krúnprinsessa høvi til at hitta nakrar av sínum landsmonnum, ið eru líka langt av landi skotin, sum hon sjálv.

Mikukvøldið bjóðar kongsfamiljan til góðan náttturða fyri innbodnum umborð á kongsskipinum Dannebrog, sum tá liggur við bryggju í Havn.

Morgunin eftir verður vitjað í Vágum, og um viðrar flúgva krúnprinsahjúnini í Mykinesi. Drotningahjúnini fara at vitja barnagarðin Sóljugarð í Sandavági og Kálvalíð í Miðvági.

Vitjanin hjá kongsfamiljuni í Føroyum endar við einum tíðindafundi á Hotel Vágum seinnapartin hósdagin 23. juni.

## Skráin fyri vitjanina:

**Mándagin 20. juni**

**Kongsfamiljan** kemur til Tórshavn við kongsskipinum Dannebrog.

Aftaná at vera boðin væl komin á havnarøkinum, vitja tey kongaligu í Tinganesi og Løgtingið.

**Krúnprinsahjúnini** vitja Dómkirkjuna og Margarinfabrikkina Tórhavnar býráð bjóðar morgunmat í Müllers pakkhúsi.

**Drotningarhjúnini** vitja Landssjúkrahúsið, Tjarnargarð, Fornminnissavnið, økið har Hoyvíkar kirkja verður bygd, har grundarsteinur verður lagdur, og William Heinesens hús.

Samstundis vitja **krúnprinsahjúnini** Dagstovnin á Hamrinum, Listasavnið og Færøernes Kommando.

**Um kvøldið** er løgmaður vertur fyri galladøgurða í Norðurlandahúsinum, við mótasýning og konsert har Eivør Pálsdóttir við Kasahópinum og Deja Vu framføra.

**Eftir døgurðan** siglir Dannebrog av Tórshavn.

**Týsdagin 21. juni**

**Kongsfamiljan** kemur til Sands við kongsskipinum Dannebrog. Siglt verður í land við skipsbátum.

Tey vitja kirkjuna og útgrevsturin í Junkarins fløtti.

**Dannebrog** siglir til Suðuroyar.

**Vágs býráð** bjóðar morgunmat í Vági.

**Drotningahjúnini** vitja Ruth Smith savnið, samstundis um **krúnprinsahjúnini** vitja Sirri.

**Kongsfamiljan** leggur leiðina framvið sluppini Jóhonnu.

Eftir hetta koyra tey kongaligu til Tvøroyrar har **drotningahjúnini** vitja Gallarí Oyggin og gamla kongaliga einahandilin. Um somu tíð vitja **krúnprinsahjúnini** sjúkrahúsið og ellisheimið.

**Hetta kvøldið** er Tvøroyrar býráð vertur fyri døgurða, sum verður í høllini í Trongisvági.

**Eftir døgurðan** siglir Dannebrog av Tvøroyri.

**Mikudagur 22. juni**

**Dannebrog** siglir inn á Klaksvík.

**Drotningahjúnini** vitja sambýlið á Heygnum, Norðoyartunnilin og Christianskirkjuna.

**Krúnprinsahjúnini** koyra til Viðareiðis, og afturkomin til Klaksvíkar hitta tey avstraliarar búsitandi í Føroyum.

**Klaksvíkar býráð** bjóðar morgunmat í Skálanum.

**Kongsfamiljan** siglir við Brimli til Fuglafjarðar.

Úr Fuglafirði verður koyrt til Leirvíkar, har **kongsfamiljan** vitjar bátasavnið.

**Drotningahjúnini** vitja Toftanes-grevsturin, samstundis sum **krúnprinsahjúnini** vitja Norðoyartunnilin Eysturoyar megin.

**Drotningahjúnini** koyra til Elduvíkar, meðan **krúnprinsahjúnini** koyra til Gjáar.

**Um kvøldið** verður góður náttturði (souper) fyri serliga innbodnum umborð á Dannebrog. Seint á kvøldi siglir Dannebrog av Tórshavn.

**Hósdagur 23. juni**

**Kongsfamiljan** koyrir frá Dannebrog í Sørvági til Gásadals.

Eftir vitjanina í Gásadali vitja **drotningahjúnini** Sóljugarð í Sandavági og Kálvalíð í Miðvági.

Viðrar, flúgva **krúnprinsahjúnini** við tyrlu til Mykinesar.

Seinni vitja **tey kongaligu** ellis- og avlamisheimið í Vágum, og Miðvágs býráð bjóðar morgunmat.

**Vitjanin** hjá kongshjúnunum endar seinnapartin við tíðindafundi á Hotel Vágum.

# Borgarstjórin bíðar við at svara Jan Christiansen

**Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, hevur í løtuni ikki hug til at gera viðmerkingar til atfinningarnar frá fyrrverandi borgarstjóranum í Havn, Jan Christiansen, um at býráðssamgongan heldur andstøðuna fullkomiliga uttan fyri alt, ið fer fram í býráðnum**

BÝRÁÐSÓSEMJA

*Terji Nielsen*

*terji@sosialurin.fo*

Fyrrverandi borgarstjórin í Havn, Jan Christiansen, hevur kært núverandi borgarstjóran í Havn; Heðin Mortensen, fyri løgtingsins umboðsmann, tí at hann metir, at borgarstjórin hevur gjørt íløgur, sum ikki hava verið fyri í nevnd.

### Fer at svara

Talan er eitt nú um arbeiði við Müllers Pakkhús, har ein brúgv verður gjørd, soleiðis at tað verður høgligari hjá fólki at koma til pakkhúsið.

Jan Christiansen og hinir limirnir í andstøðuni í Tórshavnar Býráð halda, at talan er um eina íløgu, ið sostatt átti at verið løgd fyri býráðið og viðgjørd í nevnd.

Tað er málið ikki, men tað metir borgarstjórin ikki verða nakran trupulleika, tí eftir hansara tykki er talan um eina umvæling, ið ikki skal leggjast fyri býráðið.

Heðin Mortensen sigur seg ikki hava hug til at gera viðmerkingar til atfinningarnar frá fyrrverandi borgarstjóranum í løtuni, tí hann heldur tær verða so langt úti, sum hann málber seg. Hann sigur tó, at hann fer at svara Jan Christiansen, men tað verður ikki beint nú.0

# Slakir 100 bátar á bátastevnu

***Árliga bátastevnan í Vestmanna var um vikuskifti, og slakir 100 bátar tóku lut, hóast veðurmenninir høvdu boðað frá ringum veðri***

BÁTASTEVNA

*Terji Nielsen*

*terji@sosialurin.fo*

Fyrireikararnir av árligu bátastevnuni í Vestmanna høvdu ikki væntað at stórvegis av bátum fóru at vitja stevnuna, tá ið teir veðurforsøgnirnar fyri farna vikuskifti. Veðurmenninir boðaðu frá ringum veðri, men tað vísti seg tó, at veðrið var væl betur enn væntað, og av tí sama gjørdist undirtøkan betur enn væntað.

### Fleiri avbygdabátar

Ein av fyrireikarunum, Jógvan Emil Nielsen, sigur, at bátastevnan eydnaðist væl. Sum áðurnevnt var luttakaratalið beint undir 100 bátar, og eini 500 fólk vóru til suppu, tá ið bátarnir vóru komnir at bryggju.

Jógvan Emil Nielsen sigur, at teir høvdu ikki væntað tað stóra av bátum, men lutakaratalið var væl betur, enn teir høvdu roknað við, tá ið veðurforsøgnirnar verða havdar í huga. Serliga hugaligt var tað, at tað eisini vóru nógvir avbygdabátar.

Um kvøldið var skipað fyri dansi í høllini í Vestmanna, og her var undirtøkan eins góð, sum hon plagar at verða. Jógvan Emil Nielsen sigur, at høllin var full, og at nógv fólk var komið til Vestmannar í dans.



*Slakir 100 bátar vóru við á árligu bátastevnuni í Vestmanna, sum var um vikuskiftið.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*